# Bogi Hansen fekk norðurlendsku virðislønina

**Altment koma tíðindini ikki út fyrr enn seinnapartin í dag, men tað skuldi verið púrasta vist. Bogi Hansen fær í dag Norðurlendsku umhvørvisvirðislønina, sum er 350.000 krónur**

VIRÐISLØN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinnapartin í dag skuldi avdúkast, hvør skuldi fáa umhvørvisvirðislønina hjá Norðurlandaráðnum. Almennu boðini um hetta vóru ikki váttað fyrr enn eftir evstamark okkara, og tað tyikist púra víst, at tað verður Bogi Hansen, sum fær virðislønina. Nakað sum varð meira ella minni váttað av Løgtingsins røðarapalli, har Hergir Nielsen staðfesti veruleikan. Sjálvur vil Bogi Hansen ikki gera nakrar sum helst viðmerkingar til tíðindini, men frá væl vitandi keldum hava vit tó frætt, at hetta er rætt.

Orsøkin til, at Bogi varð innstillaður til virðislønina var drúgva granskingararbeiði hansara innan veðurlagsbroytingar. Longu við innstillingini gjørdi Norðurlandaráðið greitt, at heiðurslønin í ár skuldi latast einum einstaklingini ella felagsskapi, sum við kanningum yvir eitt longri tíðarskeið hevur gjørt vart við veðurlagsbroytingar, ella sum eru komin við loysnum um at minka um umhvørvisskaðilig árin ella lekar.



*Sum skilst, so verður tað váttað seinnapartin í dag, at Bogi Hansen fær umhvørvisvirðislønina hjá Norðurlandaráðnum*

Og tað er eingin ivi um, at Bogi lýkur treytirnar í hesum. Seinastu 20 árini hevur hann støðugt verið partur av granskingini og kjakinum um, hvørjar avleiðingar sonevnda vakstrarhúseffektin tað kann fáa fyri umhvørvið. Serstakliga hevur hetta verið gjørt við atliti til Golf-streymin, sum er so týdningarmikil fyri føroyska umhvørvið og búskapin.

Seinnapartin í dag verður hátíðarhald í Nótatúni, har Bogi Hansen verður útnevndur professari, og væntast kann tí, at løtan verður eyka hátíðarlig, nú Norðurlendska umhvørvisvirðislønin eisini stendur á skránni.

## Fantastiskt

**Beint undan evstamarki okkara fingu vit orð á Jóan Paula Joensen, rektara á Fróðskaparsetrinum, sum fegnaðist um tíðindini**

VIRÐISLØN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

– Tað gleðir meg, um Bogi Hansen hevur fingið hesa viðurkenning. Hann er ein altjóða viðurkendur granskari og er millum 5 teir bestu á sínum øki um okkara leiðir. Tað er ein stórur heiður fyri bæði Fiskirannsóknarstovuna og Fróðskaparsetrið, um tað er satt, at Bogi fær umhvørvisvirðislønina sigur Jóan Pauli Joensen, rektari á Fróðskaparsetri Føroya í stuttari viðmerking. Um so er, at hald er í tíðindunum, er hetta fyrstu ferð, at føroyingar fær hesa mætu norðurlendsku virðislønina.

BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ



Ring og hoyr nærri

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

miðlahúsið
í Vágsbotni

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO
Sosialurin



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin